# Akraberg í norskan sjógv

**Hósdagin keypti reiðaríið nakrar fiskar frá Fiskavirking í Saltangará, sum teir koyrdu ígjøgnum maskinurnar. Alt vísti seg at rigga væl.**

FISKISKAPUR
*Vilmund Jacobsen*

Verksmiðjutrolarin, Akraberg, er nú farin í norskan sjógv at royna eftir toski.

Ætlanin var at loysa í Saltangará hóskvøldið kl. 20, men okkurt smávegis var eftir at gera. Seinastu boðini, manningin hevði fingið, var, at teir skuldu mynstra fríggjadagin kl. 14.00.

Vártúrurin í fjør var góður hjá skipi og manning. Teir royndu í ein mánaða og fiskaðu kvotuna, teir áttu í norskum sjógvi. Hendan var góð 200 tons. Seinasta partin av túrinum royndu teir við Bjarnoynna.



*Her liggur Akraberg og provianterar við bryggjuna í Saltangará. 32 mans eru við skipinum, nú farið verður í norskan sjógv at royna*

## 1-2 mánaðir

Tað er altíð torført at spáa um, hvussu langur ein túrur verður, men væntandi varar hesin túrurin hjá Akrabergi 1–2 mánaðir.

Tá ið skipið kemur aftur úr norskum sjógvi, verður farið á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum. Hetta plagar at verða um 15-20. apríl, men tað veldst um, hvussu skjótt kvotan verður fiskað.

Akraberg hevur verið í Íslandi seinastu 3 mánaðirnar, har verksmiðjan er sandblást, og bond og kør eru skift.

Hósdagin keypti reiðaríið nakrar fiskar frá Fiskavirking í Saltangará, sum teir koyrdu ígjøgnum maskinurnar, og her vísti alt seg at rigga, sum tað skuldi.

32 mans eru við Akrabergi hendan túrin, og skipari er Eyðun á Bergi.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, leygardagin minni vindur. Avfall, mest sum regn og hitin millum 2 og 6 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷11 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | ÷3 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 8 |
| Róm | – |
| Malorca | 17 |
| Athen | 11 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | – |
| La Paz | 5 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Millum eitt hátrýst, 1032 hPa. Yvir Grønlandi og eitt lágtrýst, 987 hPa. Við Vestur-Noreg rekur køld luft av landnyrðingi móti Føroyum.




Hátrýstið yvir Íslandi fer í landsynning og gevur góðveður fyrstu dagarnar. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/03 kl. 06⁰⁰– 18/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,0°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 17/03 kl. 06⁰⁰– 18/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 28,8 mm


www.sosialurin.fo

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

14. mars: Tendring/Mánin longst frá jørðini
22. mars: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. mar | 10.14 | 22.34 | 09.14 | 21.34 | 09.29 | 21.49 | — | 12.14 | 00.54 | 13.14 | 08.29 | 20.49 | 07.29 | 19.49 | 10.29 | 22.49 | 11.29 | 23.49 | 09.59 | 22.19 | 11.14 | 23.34 |
| 20. mar | 10.56 | 23.12 | 09.56 | 22.12 | 10.11 | 22.27 | 00.34 | 12.56 | 01.34 | 13.56 | 09.11 | 21.27 | 08.11 | 20.27 | 11.11 | 23.27 | — | 12.11 | 10.41 | 22.57 | 11.56 | — |
| 21. mar | 11.38 | — | 10.38 | 23.05 | 10.53 | 23.20 | 01.12 | 13.38 | 02.12 | 14.38 | 09.53 | 22.20 | 08.53 | 21.20 | 11.53 | — | 00.27 | 12.53 | 11.23 | 23.50 | 00.12 | 12.38 |
| 22. mar | 00.05 | 12.44 | 11.44 | — | 11.59 | — | 02.05 | 14.44 | 03.05 | 15.44 | 10.59 | 23.38 | 09.59 | 22.38 | 00.20 | 12.59 | 01.20 | 13.59 | — | 12.29 | 01.05 | 13.44 |

5 707265 100029 >